# Havsbrún setti met

**Ídnaðarvirkið Havsbrún í Fuglafirði, hevur ongantíð tikið ímóti so nógvum fiski, sum seinastu tíðina**



*Á Havsbrún hava tey ongnatíð havt so nógv at gera sum seinastu tíðina*

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*

Á Havsbrún í Fuglafirði hava tey havt nógv at gera seinastu tíðina – so nógv sum ongantíð fyrr.

Hetta summarið hevur virkið nevniliga tikið ímóti so nógvum fiski sum ongantíð fyrr.

Í juli mánaða í ár tók Havsbrún ímóti yvir 30.000 tonsum av uppsjóvarfiski, ella yvir 1.000 tons um dagin, og so nógv hevur virkið ongantíð tikið ímóti í ein mánaða fyrr.

Tað allarmesta av fiskinum er svartkjaftur.

Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún sigur, at vanliga hava bátarnir fiskað meiri eftir lodnu hesa árstíðina.

Men fiskiskapurin eftir lodnu hevur ikki verið nakað serligur. Harafturímóti hevur fiskiskapurin eftir svartkjafti verið góður og prísurin hevur eisini verið áleið, góð 70 oyru fyri kilo. Harafturat er svartkjafturin undir Føroyum í løtuni, so tað hevur eisini verið stutt at sigla.

– Alt í alt hevur tað tískil loyst seg betur at fiska svartkjaft hesa tíðina, sigur Bergur Poulsen

Teir flestu bátarnir, sum hava avreitt, eru teir føroysku, men eisini nakir íslendskir bátar hava avreitt til Havsbrún hesa tíðina.

Bergur Poulsen sigur, at hetta hevur ført við sær, at framleiðsluorkan á Havsbrún hevur verið fult útnyttað seinastu tíðina. Tvs, at tey 100 fólkini á virkinum, hava arbeitt í vaktum, klokkuna runt.

Hvussu verður framyvir, veit Bergur Poulsen ikki.

Hann væntar ikki so nógvan fisk í august mánaða og nú fara bátarnir eisini í makrelin.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo


## Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar - 30. juni 2001

RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI TÍÐARSKEIÐIÐ 1. JANUAR - 30. JUNI 2001

| | 1/1-30/6 2001 |
|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 242.325 |
| Inntøkur frá kostnaði, ómaksgjøldum og provisiónum | 4.177.085 |
| Útreiðslur til kostnað, ómaksgjøld og provisiónir | -422.459 |
| Úrslit av fíggjarpostum | 3.996.951 |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | -3.445.145 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | -113.422 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 |
| Úrslit áðrenn skatt | 438.384 |

FÍGGJARSTØÐA PR. 30. JUNI 2001

| | 30/6 2001 |
|---|---|
| OGN | 8.025.649 |
| Áogn í lánistovnum o.a. | 437.455 |
| Onnur áogn | 3.001.800 |
| Lánsbrøv o.a. | 118.125 |
| Partabrøv o.a. | 747.043 |
| Ítøkiligar ognir | |
| | 12.328.072 |
| OGN TIL SAMANS | |
| EGINOGN, AVSETINGAR OG SKULD | |
| Onnur skuld | 1.543.994 |
| Eginogn | |
| Partapeningur | 10.000.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.913.813 |
| Flutt úrslit | -1.129.735 |
| Eginogn til samans | 10.784.078 |
| EGINOGN, AVSETINGAR OG SKULD TIL SAMANS | 12.328.072 |

VIÐMERKING TIL RAKSTURIN.
Felagið fekk loyvi at reka virðisbrævameklaravirksemi tann 28. februar 2001.
Ti verða eingi samanberingstøl víst.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag


# Arnold cruisar sum tónleikari

**Arnold Ludvig er ein av tónleikarunum umborð á risastóra ferðamannaskipinum, Crown Princess. Í farnu viku vitjaði danska Ekstrablaðið umborð á skipinum og gjørdi millum annað samrøðu við føroyska bassspælaran**



*Arnold Ludvig ferðast nú á havinum sum tónleikari. Hann býr annars í Montreal, men vónar at flyta til Danmarkar at búgva einaferð í framtíðini*

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Crown Princess er eitt ovurhonds stórt og nýmótans ferðamannaskip, sum í løtuni siglir til Svøríki, Noreg, Letland og Pólland. Umborð á skipinum, sum er 245 metrar langt, arbeiða 377 fólk, og ein av teimum er føroyski tónleikarin, Arnold Ludvig, sum spælir tónleik í einari av snotuligu barrunum umborð á skipinum.

Í farnu viku var Crown Princess í Keypmannhavn, og tá vitjaði danska Ekstrablaðið umborð. Teir tóku myndir av vakra skipinum og greiddu í leygardagsblaðnum lesarum sínum frá, hvussu lívið er umborð.

Millum filipinskar dekkarar, amerikanskar tænarar og italskar yvirmenn fann Ekstrablaðið ein mann, sum hevði tilknýti til Danmark, og tað var føroyingur Arnold Ludvig. Arnold var ein av limunum í tónleikabólkinum Plúmm, og hann hevur eisini spælt í øðrum føroyskum tónleikabólkum.

– Eg sakni familjuna ógvuliga nógv. Vit hava sattelittelefon umborð, og eg ringi heim hvønn einasta dag, sigur Arnold Ludvig við Ekstrablaðið.

Arnold er búsitandi í Kanada saman við kanadisku konu síni og 11 ára gomlu dóttir hennara. Arnold spælir vanliga tónleik á jazzklubbum í Montreal, har hann hevur sína egnu trio. Føroyski tónleikarin er serstakliga dugnaligur bassspælari, og hann hevur millum annað fingið sín førleika á skúlum í Reykjavík og Montreal.

Hann greiðir Ekstrablaðnum frá, at han droymir um at sleppa aftur til Keypmannahavn at búgva, og har vónar hann at kunna seta saman ein nýggjan tónleikabólk.



listastevna føroya 2001

# Palle østi sjálvt Neptum

**Tað var av sonnum ein stór uppliving at hoyra Palle Mikkelborg og hansara fyrstafloks harkalið leika í Klæmintsgjógv týsdagin. Hóast hampuligt veður, gjørdist løtan við tónleiki heldur ókyrr og kanska var tað Palle, ið við himmalskum tónleiki náddi heilt í dýbdina og østi havgudin**

listastevna føroya 2001

*Dagfinn Olsen*













Týsdagin hevði Listastevnan forvitisliga uppliving á skránni. Navnframi Palle Mikkelborg, ið hevur fingið Norðurlendsku Tónleikheiðurslønina í ár, leikti úti í Hesti, í Klæmintsgjógv.

Og hetta gjørdist av sonnum ein náttúru uppliving og ein tónlistarliga ógloymandi løta.

Í besta veðrið stevndi Norðlýsi av Havnini og Birgir Enni, skipari, greiddi frá trygdarviðurskiftum og skipinum, sum er bygt í Havn undir seinna heimsbardaga og liðugt sama dag, sum kríggið endaði. Í 1985 fóru menn undir at umvæla skipið og síðani 1989 hevur verið siglt við ferðafólki. Og at sigla við slíkum fari er í sær sjálvum ein uppliving, men longu við fráferð spáddi skiparin, at fyri framman lá helst størsta tónleikaupplivingí í hellishøpi nakrantíð.

### Conserto Grotto no. 1

Túrurin út í Hest gekk av tí besta. Eisini gekk hampuliga væl at fáa fjøldina í gummi speddbátarnar og inn í hellið, sum hesa løtuna var hellið hjá gandakallinum Mikkelborg, ið er kendur fyri at ganda tað mest óvæntaða úr trompetini og sínum viðleikarum.

Conserto Grotto no. 1 var á skránni, kunngjørdi Palle, eftir at ljoðviðurskifti og annað var komið á pláss.

Ein sonn uppliving av tónum og samansetingum gjørdist løtan, ein alheimur fyri seg, leysur av tíð og kringstøðum. Bert tónleikarar og hellisljóðið ráddu.

Eingin kom snikkaleysur frá hesi tónleikauppliving, ið fór beint at hjartanum. Og sum Birgir skipari hevði spátt, so gjørdist hetta størsta tónleikaupp-living í hellishøpi nakrantíð.

Síðsti fuglurin á rókini í Klæmintsgjógv tók til rýmingar. Hugflog og sinnisbylgjur náddu hæddirnar. Men eisini uttanborða byrjaði at skvampa. Og so skjótt, sum tónleikurin var komin til ein enda, ella har á leið, ráddi skiparinav at halda avstað úr Klæmintsgjógv, tí eisini har náddu bylgjurnar nú ávísar hæddir.

Heldur ikki havgudurin Neptum hevði latið hesa løtuna farið framvið, uttan sinnisrørslu, tað var eyðsæð.

Siglt verður verður nakað norðureftir, fyri at finna betri líkindi at fáa fólk umborð aftur á trygga Norðlýsi. Og væl umborð aftur á Norðlýsinum, eftir løtu, ið Palle nevndi »noget dramatisk«, kom góða fiskasuppan hjá Birgiri væl við, og stevnast kundi aftur móti Havnini. Og longu sá út, sum havgudurin var komin fyri seg aftur, eftir sálarhvøkkin, og var blíðkaður.

### Palle fann sítt pláss í alheiminum

Palle Mikkelborg hevur arbeitt saman við føroyska tónleikaframleiðaranum Óla Poulsen á síni síðstu fløgu. Og har var júst arbeitt við havinum og Palle hevur takkað Óla fyri at hava leitt seg inn í henda heim av ljóðum, ið annars eru honum ókend.

Men nú kann Palle sanniliga práta við, eftir dramatiska tónleikatúrin í Hesti. Og óivað verður prátað, tí Palle Mikelborg og Óli Poulsen eru vorðnir vinmenn.

- Eg bað Óla gera eitt ocean landslag. Nú veit og hoyri eg, at hetta eru ljóðini og hetta hevur djúpa ávirkan á meg. Annað, ið er eitt upplivilsi, er ljósið í Føroyum, eisini hetta er eitt serligt drama, sigur Palle og vit staðfesta á dekkinum á Norðlýsinum orðatakið um gløggu eygu gestsins.

- Óli bað meg heilsa Føroyum og føroyingum og tað geri hervið, sigur Palle.

Palle er ikki í iva, tá hann sigur, at túrurin í Hesti var eitt upplivilisi. Kristian Blak hevur roynt at greitt honum frá, men nú skilir hann, at hetta er jú ikki til at greiða frá, men má upplivast, tí klangurin er heilt serstakur.

Palle Mikkelborg sigur, at tey í hellinum spældu ymiskt, sum tey ongantíð áður hava roynt, tí so positivt var at royna hesar nýggju umstøður.

- Tað hendir ymiskt undir slíkum umstøðum og tað er gott at kenna, sigur Palle, ið ikki ivast í, at hetta er nakað, ið tónleikararnir fara at minnast og taka við sær.

- Vit hava fingið eitt dramatiskt upplivisli. Tað eru stórar kreftir, ið gera vart við seg. Ein sær, hvussu sárbarur ein er og sær sítt pláss í alheiminum. Slíkar kreftir spyrja ongan eftir og leggja líka í, um talan er um kendan trompetleikara ella nakran annan, sigur Palle hugfjarur.

### Heiðursvinnari

Í hugnaliga dekksprátinum við kenda trompetsnillingin Palla, geri eg eina roynd at koma inn á stóra heiðurin, hann hevur vunnið, hóast hann óivað er spurdur um Norðurlendsku Tónleikaheiðurslønina fleiri hundrað ferðir.

- Eg blívi jú hvørki verri ella betri av at hava fingið heiðurslønina, men eg visti ikki av, hvønn týdning heiðurslønin í veruleikanum hevur, sigur Palle Mikkelborg.

Hann vónar at nýta heiðurin til at hjálpa ungum tónleikarum fram á leið, at geva teimum okkurt.

- Tað verður sagt, at eg fari um mørk. Eg vóni at bróta sosial mørk, at fara um tónamørk og lurtaramørk, sigur Palle Mikkelborg.

- í dag fái eg fleiri tilboð, sum eg ikki leggi í, sum mær ikki dámar. Eg komi í onnur sosial samnbond. Men ofta vilja tey bert hava heiðursvinnaran, ikki Palla Mikkelborg, tey kenna hann kanska ikki eingang, sigur Palle um nakað av tí, sum stendst av at vinna so stóra heiðursløn.

Palle, sum áður hevur vitjað í Føroyum til jazzfestival saman við t.d. Niels Henning Ø. Petersen, sigur seg fegin vilja vitja aftur og hann vísir ikki aftur, at verður møguleikin, so er ein ætlan við upptøkum í Klæmintsgjógv ikki av vegnum.

Við Palla Mikkelborg á hendingaríku og tónlistaligu ógloymandi ferðini í Hesti vóru Helen Davies, ið leikar hørpu, Moussa Diallo, bassleikari, Klavs Menzer, trummuleikari, Mikkel Nordsø, guitarleikari og Ayi Solomon, áslátt-ur.